Føroyingar eiga avger›arrættin

Ta› er føroyska ta› føroyska fólki› og bert ta› føroyska fólki›, i› ger av, um Føroyar skulu úr ríkisfelagsskapinum. Hetta sló› danski forsætisrá›harrin enn einafer› fast eftir fundin í 21 mannanevndini í gjár

FULLVELDIS-SAMRÁ‹INGAR
Magnus Dam og John Johannessen Keypmannahavn

Føroysku fólkatingslimirnir, Óli Breckmann og Jóannes Eidesgaard, settu í gjár bá›ir danska forsætisrá›harranum spurningin, hvat hann meinar vi›, tá hann sigur, at hann ikki metir føroyingar at vera eitt »sjálvstø›ugt fókarættarligt subjekt.

Hetta gjørdu teir á fundinum í serligu 21 mannanevndini hjá Fólkatinginum, sum fylgir samrá›ingunum.

Svari›, teir fingu frá forsætisrá›harranum var greitt. Hann seg›i, at ta› er ta› føroyska fólki›, sum sjálvt ger sína lagnu av.

– Ta› eru føroyingar og bert føroyingar, i› ger av, um Føroyar skulu ver›a verandi í ríkisfelagsskapinum ella ikki, seg›i danski forsætisrá›harrin.

Hetta svari› eru bá›ir teir føroysku fólkatingslimirnir, sum eru eyglei›arar í 21 mannanevndini, nøgdir vi›.

Vit hava nú fingi› sta›fest, at ta› eru føroyingar sjálvir, i› avgera sína lagnu. Hetta sigur seg sjálvt, og ta› er júst ta›, vit vildu hava at vita, sigur Óli Breckmann.

– At vera eitt »sjálvstø›ugt fólkarættarligt subjekt« er naka›, man er, tá man er ein suverenur statur, gjørdi forsætisrá›harrin greitt.

Hesum eru bá›ir teir føroysku fólkatingslimirnir samdir vi› honum í.

Hóast ivi hevur veri› um avger›arrætt føroyinga, slær Nyrup nú fæst, at føroyingar hann sjálvir

Nú má røkka ella støkka

Samrá›ingarfundurin millum stjórnina og landsst‡ri› í gjár var kanska tann seinasti í rø›ini um føroyskt fullveldi. Løgma›ur var alt anna› enn bjartskygdur á›renn samrá›ingarfundin

FULLVELDIS-SAMRÁ‹INGAR
John Johannesen og Magnus Dam Keypmannahavn

Vónirnar um eina loysn á fullveldismálinum vóru ikki gó›ar, á›renn føroyska samrá›ingarnevndin fór á fund vi› donsku stjórnina klokkan 14 í gjár. Talan var hesufer› um fjór›a samrá›ingarumfar, og higartil er fullveldistilgongdin nógv meira seinka›, enn landsst‡ri› upprunaliga hev›i ætla›.

Higartil hava ta› veri› ósemjur heldur enn semjur, sum hava merkt samrá›ingarnar, og landsst‡ri› kennir seg alt meira kroyst,, samstundis sum tí›in er vi› at renna undan landsst‡rinum.

Anfinn Kallsberg, løgma›ur, hev›i tí ikki serliga gó›ar vónir undan fundinum í gjár.

- Vit hava nú fyrireika› fullveldistilgongdina í 2 og eitt hálvt ár. Vit hava samrá›st trgíggjar fer›ir uppá sjey mána›ir, og enn er eingin ni›urstø›a komin burturúr nøkrum av fundinum, sigur løgma›ur.

Anfinn Kallsberg er sera misnøgdur vi› gongdina higartil. Hann vísir á, at landsst‡ri› hevur gjørt eitt umfatandi útgreiningararbei›i í Hvítubók, har roynt hevur veri› at l‡sa allar teir vi›komandi spurningarnar.

- Hetta er eitt arbei›i, sum vit upprunaliga høvdu ætla› at gera saman vi› dønum, men ta› vildi stjórnin ikki. Vit gjørdu so hetta arbei›i› sjálvir, men hóast alt hetta tilfari› nú liggur á bor›inum, heldur stjórnin fram vi› at vísa á, at ney›ugt er at geva tol, gera fleiri útgreiningar og kanna alt ni›ur í minstu smálutirnar. Hetta tykist mær alt meira at vera ein væl fyrireika›ur sjónleikur frá danskari sí›u, sigur løgma›ur.

Anfinn Kallsberg vildi ikki vísa aftur, at fundurin í gjár kanska var tann seinasti millum stjórnina og landsst‡ri› eftir verandi leisti.

- Nú mugu vit fáa sta›fest, um ta› yvirhøvur ber til innihaldsliga og innan tí›arkarmarnar at fáa eina loysn, sum bá›ir partar kunnu taka undir vi›, sigur ein avgjørdur løgma›ur.

Á fjór›a fundinum var tí eitt or› ovast á dagsskránni, og ta› var status – nú skal stø›an gerast upp.

Løgma›ur vísir á, at danir higartil hava víst aftur at eftirlíka føroyska ynskinum um eina 15 ára langa skiftistí›. Vi›víkjandi ríkisborgararættindunum vilja danir ikki gera somu loysn fyri Føroyar sum fyri Ísland á sinni. Spurningurin um umsitingarliga samstarvi› er ikki loystur enn, og har vilja danir hava nógv fleiri útgreiningar á bor›i›. Kongshúsi› eru partarnir ikki byrja›ir at samrá›ast um enn, og gjaldoyraspurningurin er heldur ikki avgreiddur. Samanumtiki› eru samrá›ingarnar so at siga ongan veg komnar, vísir løgma›ur á.

- Vit mugu nú finna útav, um vit nakrantí› koma á mál, ella um partarnir eru so grundleggjandi ósamdir og langt frá hvør ø›rum, at ta› er ógjørligt at finna eina loysn. Eg havi jú sagt, at vit ikki fara út til eina fólkaatkvø›u, um ta› er ósannlíkt, at meiriluti yvirhøvur ver›ur fyri endaliga sáttmálanum, sigur Anfinn Kallsberg.

Ta› var ein dapurskygdur løgma›ur, sum fór á fund vi› danir í gjár

Løgma›ur hevur sostatt lítlan hug at halda fram vi› at samrá›ast, um eingi útlit eru fyri, at endaligi sáttmálin fer at líkjast upprunaliga sáttmálaupplegginum hjá landsst‡rinum. Hann sær heilt einfalt lítla og onga meining í hesum.

Anfinn Kallsberg ivast ikki í, at endamáli› hjá stjórnini er at draga samrá›ingarnar út.

- Stjórnin vil hava okkum at grei›a frá ni›ur í hvønn smálut, hvat vit hava brúk fyri av umsitingarligum samstarvi í einum skiftistí›arskei›i. Hvussu nógvar embætismenn á tí og tí økinum hava vit brúk fyri, og hvussu nógvar tímar hava vit brúk fyri teimum. Hetta vita vit ikki ídag, tí vit vita ikki, hvussu nógv orka skal til fyri at byggja upp eina sjálvstø›uga umsiting. Vi›víkjandi ø›rum økjum – eitt nú verjuøkinum og gjaldoyraøkinum, sum eru donsk málsøki - hava vit als einki innlit í vi›urskiftini, vísir hann á.

- Stjórnin má nú siga okkum, um hon ætlar at halda fram vi› hesi kósini ella um hon vil slaka naka› og gera meira yvirorna›ar avtalur um hesi vi›urskiftini, sigur hann.

Løgma›ur vil ikki koma inn á, hvat hendir, um ta› á fundinum vísir seg, at eingi útlit eru fyri einari semju. Men givi› er, at vit so hava eina n‡ggja stø›u, og landsst‡ri› má so gera upp vi› seg sjálvt, hvussu vit røkka málinum ella um máli› sjálvt skal broytast.

Noyddir at gjalda fer›ina sjálvir

Teir tríggir løgtingslimirnir í uttanlandsnevndini, sum fóru til Keypmannahavnar á fund í sambandi vi › fullveldissamrá›ingarnar, fingu hvørki dagpening ella fer›ina goldna frá løgtinginum

FULLVELDIS-SAMRÁ›INGAR
Magnus Dam og John Johannessen Keypmannahavn

Tá forma›urin í uttanlandsnevndini, Hergeir Nielsen, vendi sær til løgtingsskrivstovuna fyri at fáa fer›ase›larnar til Keypmannahavnar hjá einum parti av limunum í nevndini goldnar, var› hetta s‡tt honum.

Løgtingsskrivstovan vildi ikki rinda fer›ase›larnar, tí heilt greitt var, at nevndin fór ikki at ver›a vi›tøkufør í Keypmannahavn. Andstø›ulimirnir høvdu tá bo›a› frá, at teir ikki fóru at luttaka á fundinum.

Heldur ikki bar til at fáa rinda›an dagpening til teir liminar, sum møttu upp í Keypmannahavn.

– Fer›in í Danmark er ikki naka›, sum vit á løgtingsskrivstovuni vita um, anna› enn ta›, vit hava sæ› í pressuni, sigur Súsana Danielsen, stóri á løgtingsskrivstovuni.

Flokkarnir rinda›u

Í landsst‡rinum eydna›ist heldur ikki at finna pening til fer›ina til Danmarkar. Løgma›ur hev›i á›ur klárt melda› út, at uttanlandsnevndin, eins og á›ur, er vælkomin at vera til sta›ar á Christiansborg, men at rinda fyri fer›ina vildi landsst‡ri› ikki.

– Vit mugu ikki blanda tingini saman. Vit hava skyldu at kunna uttanlandsnevndina, men ta› hev›i ikki veri› rætt, um landsst‡ri› rinda›i fyri fer›ina hjá nevndini til Danmarkar, sigur Anfinn Kallsberg, løgma›ur. Hann vísir á, at virksemi› hjá uttanlandsnevndini er partur av løgtingsarbei›inum og ikki landsst‡risarbei›inum.

Endin av hesum var›, at teir tríggir samgongulimirnir, Jákup Sverri Kass úr Sjálvst‡risflokkinum, Ey›un Viderø úr Fólkaflokkinum og Hergeir Nielsen úr Tjó›veldisflokkinum, fingu sínar egnu flokkar at rinda fer›ase›ilin.

Afturat teimum trimum, kom Álvur Kirke úr Mi›flokkinum eisini vi› til Danmarkar at eyglei›a samrá›ingarnar. Álvur Kirke er ikki limur í uttanlandsnevndini.

Ætla›i fundurin í uttanlandsnevndini í Christiansborg í gjár var› ikki settur. Nevndin var ikki vi›tøkufør, og tí vóru løgtingslimirnir bert eyglei›arar undir samrá›ingunum.

Á seinasta fundinum í uttanlandsnevndini á›renn hon fór til Danmarkar, s‡ttu andstø›ulimirnir at møta á fundi í Keypmannahavn. Hetta hev›i vi› sær, at nevndin ikki var vi›tøkufør á ætla›a fundinum í gjár

Súsanna Danielsen, stjóri á løgtingsskrivstovuni veit einki um fer›ina hjá uttanlandsnevndini í Keypmannahavn, anna› enn ta›, hon hevur lisi› í blø›unum